## Semingsuppskot

Í millum øðrumegin **Føroya Pedagogfelag**

og hinumegin **Fíggjarmálaráðið** og **Kommunala Arbeiðsgevarafelagið**

verður gjørd henda semja.

1. Sáttmálarnir og tænastumannaavtalan verða endurnýggjað fyri tíðarskeiðið frá 1. oktober 2015 til 1. oktober 2017.

2. Tann 1. oktober 2015 hækka mánaðarlønirnar 2,0%. Tann 1. oktober 2016 hækka mánaðarlønirnar 1,88%.

3. Broyttar skálagongdir:

   Hjálparfólk – ganga stigini 2 – 7
   Hjálparfólk á stig 1 flyta á stig 2 og fáa nýggjan starvsaldur 1. oktober 2015.
   Broytingin ávirkar bert tey, sum flyta úr stig 1.

   Pedagogar – ganga stigini 11 – 19
   Pedagogar, sum hava verið meira enn 2 ár á stig 18 flyta á stig 19.

4. Soljóðandi áseting í grein 3 A. verður strikað "Dagrøktarleiðarin í Tórshavnar kommunu verður lønt á lønarstigi 35."

5. Ásetingin í grein 3 A. – "Serlig viðbót fyri børn við serligum tørvi" verður strikað, frá 1. januar 2016.

6. Grein 7. Stk. 1. Verður soljóðandi:
   "Fyri hjálparfólk sum starvast í minst 15 tímar um vikuna, er eftirlønargjaldið 10%.
   Arbeiðsgevarin rindar eftirlønargjald.
   Upphæddin fer í eftirlønarskipan, sum partarnir gera serstaka semju um.
   Fyri tey yvir 60 ár – ella sum vegna heilsu – ikki kunnu koma í eftirlønarskipanin, gera partarnir eina uppsparingarskipan ella líknandi."

7. Grein 21 stk. 2 í sáttmálanum fyri pedagogar verður strikað.

8. Grein 27, stk. 2 í sáttmálanum fyri pedagogar og grein 17, stk. 2 í sáttmálanum fyri hjálparfólk verða soljóðandi: "Ætlar setanarmyndugleikin at siga starvsfólk úr starvi, skal ætlanarskriv um uppsøgn verða latið felagnum og starvsfólkinum til ummælis við minst 14 daga freist, um ikki eymir upplýsingar sambært grein 27 í fyrisitingarlógini ella revsilógini eru í tí (í tí føri fær Føroya Pedagogfelag samstundis fráboðan um, at ætlanarskriv er sent starvsfólkinum).

9. Viðvíkjandi avtaluni um starvslærarar í sambandi við námsfrøðiligu útbúgvingina á Fróðskaparsetur Føroya er semja um:

Sum nýggj §23a:
*Starvslæruvegleiðarar*

Uppgávan sum vegleiðari í starvslæruni innan námsfrøði á Námsvísundadeildini á Fróðskaparsetur Føroya verður samsýnd við:

- Fyri hvønn starvslærutíma pr næming er samsýningin 0,1% av endalønini (mánaðarløn stig 19) hjá pedagogum.
- Fyri hvønn samtalutíma pr næming: 0,65% av endalønini (mánaðarløn stig 19) hjá pedagogum.
- Vikarsamsýning til stovnin fyri hvønn samtalutíma er tímalønin hjá pedagogum á endastigi.

Stk. 2. Frítíðarløn (12%) verður latin.

Stk. 3. Samsýningarnar verða útgoldnar sambært uppgerð eftir lokið starvslæruskeið.

**Protollat**

1. Í sáttmálaskeiðinum verður sett nevnd at kanna almenna lønarlagið bæði sum heild, og hjá einstøkum starvsbólkum.
   Nevndin skal lýsa møguleikar fyri at skipa eina felags lønarskipan innan tað almenna.
   Nevndin skal eisini kanna, um sáttmálarnir og avtalurnar tað almenna hevur við fakfeløg, skapa hóskandi karmar fyri at kunna broyta og endurnýggja almenna geiran, soleiðis at hann skynsamast kann røkka sínum endamálum.
   Á vári 2016 verður skipað fyri verkstovu fyri almennar arbeiðsgevarar og fakfeløg, har viðgjørdur verður spurningurin um, hvussu nevndin skal vera skipað og hvør arbeiðssetningurin skal vera.

2. Partarnir eru samdir um at endurskoða avtaluna um fráfaringaraldurin hjá tænastumonnum, og hvat ið skal henda við eftirlønini, tá ið tænastumenn fara úr starvi áðrenn teir hava fylt 67 ár. Fíggjarmálaráðið fer eisini at taka hini feløgini við í arbeiðið.

3. Sáttmálapartarnir skipa samstarvsráð við tveimum umboðum frá hvørjum. Samstarvsráðið hevur til uppgávu at fylgja við og umrøða viðkomandi mál innan sáttmálaøkið.

4. Í sáttmálaskeiðinum viðgera partarnir um tað er ein fyrimunur at samanskriva sáttmálarnar í ein sáttmála.

5. KAF og FP seta bólk at gera uppskot til arbeiðstíðarreglur fyri kommunala økið, serliga verður hugsað frítíðarskúlar og -klubbar (Kvøld og náttarvirksemi).

Tórshavn tann 12.01.2016

Føroya Pedagogfelag

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið

Fíggjarmálaráðið

**Avtala um eitt gott og mennandi arbeiðsumhvørvi**

Fíggjarmálaráðið, Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Pedagogfelagið (hereftir partarnir) staðfesta, at eitt gott arbeiðsumhvørvi og eitt álitisríkt samstarv er avgerandi fyri, at starvsfólk og leiðsla trívast. Hetta er tí eisini avgerandi fyri góðskuna tá arbeiðsuppgávur verða loystar, og fyri produktivitetin á arbeiðsplássinum. Partarnir vilja í samstarvi seta fokus á, at stimbra eitt gott arbeiðsumhvørvi – herundir eisini sálarliga arbeiðsumhvørvið.

Felags eyðkenni fyri arbeiðspláss við góðum arbeiðsumhvørvi er, at fylgjandi eyðkenni ganga aftur: Álit, sínamillum virðing og viðurkenning.

Fyritreytin fyri hesum er eitt gott samstarv og leypandi samskifti millum leiðslu og starvsfólk, her ímillum álitisfólk og trygdarumboð. Eisini er fyritreytin ein góð felags uppfatan av, hvør kósin er, hvørjar kjarnu arbeiðsuppgávurnar eru, innan hvørjar karmar hesar skulu loysast, og fatan av hvørjar væntanirnar eru til, hvussu arbeiðsuppgávurnar skulu loysast.

Fyri at tryggja eitt gott og mennandi arbeiðsumhvørvi, er týðandi, at øll á arbeiðsplássinum taka ábyrgd. Leiðslan, samstarvsnevnd, álitisfólk og starvsfólk mugu tí taka felags ábyrgd – bæði fyri, at tað gongur væl, og tá møguligir trupulleikar eru og skulu loysast.

Er arbeiðsumhvørvið ikki nóg gott – eitt nú sálarliga – kann hetta elva til strørri sjúkrafráveru, mistrivna, at fólk fara úr starvi, og at arbeiðsuppgávur ikki vera loystar so væl sum møguligt.

Fyri at fyribyrgja hesum, hevur tað stóran týdning leypandi at halda eyga við arbeiðs-umhvørvinum. Fyri at kunna arbeiða málrættað við at tryggja eitt gott og mennandi arbeiðsumhvørvi krevst vitan um tey viðurskifti, sum ítøkiliga kunnu hava jaligan ella neiligan týdning fyri arbeiðsumhvørvið.

Partarnir eru samdir um, at stuðla átøkum, ið fremja eitt gott og mennandi arbeiðsumhvørvi. Partarnir ásanna, at munur er á ymiskum arbeiðsplássum, arbeiðsuppgávum og starvsfólkum. Átøk mugu tí taka útgangsstøði í eini felags fatan av, at tey átøk, ið gera størstan mun eru tey, ið taka útgangsstøði í umstøðunum á ítøkiligu arbeiðsplássunum.

Arbeiðsgevararnir fara at kunna leiðslur og starvsfólk á landsins arbeiðsplássum um stóra týdningin av, at leiðsla og starvsfólk í felag tryggja eitt gott arbeiðsumhvørvi. Eisini fara Arbeiðsgevararnir í sáttmálaskeiðnum at gera vegleiðing um, hvussu leiðslur og starvsfólk skulu fyrihalda seg, um starvsfólk eru strongd. Hartil fer Fíggjarmálaráðið í næstum at seta í verk vegleiðing um sjúkrafráveru. Vegleiðingarnar verða gjørdar í samráð við fakfeløgini.

Pedagogfelagið fer í sáttmálatíðarskeiðnum at bjóða álitisfólkunum skeið í, hvussu tey best kunnu viðvirka til, at fremja eitt gott og mennandi arbeiðsumhvørvi saman við starvsfólkum og leiðslu.

*Tórshavn tann 12. Januar 2016*

Føroya Pedagogfelag | Kommunala Arbeiðsgevarafelagið | Fíggjarmálaráðið